tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

**Dagfesting:** 28.01.2021 kl. 17:00
**Málnr.:** 20/00367

Nevndarlimir: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Jónleyg Jespersen Bech, Bjarni Hammer, Kristina Roest, Súsanna Bertholdsen

Varalimir:

Ikki møtt:

Onnur:

Nevndarskrivari: Fróði Mortensen

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 5/21 | 20/00409-3 | TB-Fótboltur umsókn um stuðul og nýtslurætt til Stórá kappingarárið 2021 |
| 6/21 | 20/00399-1 | Útboð av rakstri av kantinuni í ítróttarhøllini |
| 7/21 | 20/00364-8 | 2 viðgerð av -val av limum í "Aðrar nevndir" §31 Barnaverndina |
| 8/21 | 20/00364-10 | 2 viðgerð av -val av limum í "Aðrar nevndir" §30 Skattakærunevndina |
| 9/21 | 21/00020-1 | Føroya Eftirskúli -val av nevnd |
| **Til kunningar** | | |
| 2/21 | 21/00035-1 | Skattatøl 2021 |
| | | |

Til støðutakan

**5/21**
**20/00409-3 TB-Fótboltur umsókn um stuðul og nýtslurætt til Stórá kappingarárið 2021**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 28.01.2021 | 5/21 |

Málslýsing:

**Kommunustjórin 05.12.2020**
Til viðgerðar er umsókn um stuðul, sum umsitingin hevur móttikið frá TB fótbóltur til virksemið hjá felagnum komandi ár.

**Mentanarnevndin 8. desember 2020 kl. 13:00 Avgerð**
Einmælt samtykt at málið verður viðgjørt á býráðsfundi, har umboð fyri nevndina í TB vera boðin á luttaka og greiða frá ætlanunum fyri komandi kappingarár.

**Býráðið 28. januar 2021:**
Kristin Michelsen skjýtur upp, at umsóknin til stuðul til TB, verður beint aftur í Mentanarnevndina.
**Einmælt samtykt.**
Kristin Michelsen skjýtur upp, at TB fær nýtslurættin til felagshúsið og vøllin við Stórá kappingarárið 2021.
**Einmælt samtykt.**

6/21
**20/00399-1 Útboð av rakstri av kantinuni í ítróttarhøllini**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 21.12.2020 | 10/20 |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.01.2021 | 6/21 |
| 3 Býráðið | 28.01.2021 | 6/21 |

**Málslýsing:**

**Kommunustjórin 11.05.2020**
Anita Farstad hevur við Tvøroyrar kommuna leigusáttmála av kantinuni í Trongisvágs Skúla, sum gongur út 30. juni 2020, og hevur Anita Farstad sent umsitingin umsókn, um leingjan av leigusáttmálanum við 5 árum fram til 30 juni 2025.

**Mentanarnevndin, 11. maj 2020, pkt. 4:**
Einmælt samtykt at raksturin av kantinuni verður boðin út av nýggjum frá 30.06.2020 í eitt tíðarskeið á 5 ár. Og at verandi sáttmálin verður endurskoðaður, soleiðis at kantina er opin tá høllin er opin, og at skúlanæmingar fáa atgongd til kantinua í skúlatíð. Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin, 20. maj 2020, pkt. 11:**
Anita Farstad var boðin at luttaka á fundinum fyri at greið frá um gongdina og raksturin av kantinuni. Einmælt samtykt at beina málið aftur í mentanarnevndina til at endurskoða verandi sáttmálan, og fáa útgreina hvønn tørv og ynskir eru fyri at hava kantinuna opna.

**Kommunustjórin 25. maj 2020.**
Sum áður fráboðað av kommunustjóranum 11.05.2020, hevur Anita Farstad og Tvøroyrar kommuna leigusáttmála um raksturin av kantinuni í Trongisvágs Skúla, sum gongur út 30. juni 2020. Anita Farstad hevur sent umsitingin umsókn, um leingjan av leigusáttmálanum við 5 árum fram til 30 juni 2025.
Ásett er í verandi sáttmálanum §4. "Sáttmálin um raksturin er galdandi í tíðarskeiðinum 01.07.2015-30.06.2020 við møguleika fyri leingjan. Partarnir kunna í seinasta lagi 6.mnd áðrenn hesin sáttmáli gongur út, semjast um at leingjan". Anita Farstad er boðin á fundin í mentanarnevndini mánadagin 8. juni, kl. 13:00, at greiða frá um gongdina og raksturin av kantinuni.

**Mentanarnevndin, 8. juni 2020, pkt. 1:**
Anita Vibergsdóttir skjótur upp at leingja sáttmálan í 12.mnd. meðan Súsanna Bertholdsen og Bjarni Hammer mæla til at leingja sáttmálan í 6. mnd.
Samtykt at leigusáttmálin verður longdur í 6. mnd., og umsitingin brúkar hesa tíðina til at gera klárt til at bjóða út av nýggjum. Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Kommunustjórin 12.06.2020**
Til viðgerðar er tilmælið frá Mentanarnevndini at leingja verandi leigusáttmálan av rakstrinum av kantinuni í Trongisvágs Skúla millum Tvøroyrar kommunu og Anitu Farstad, sum gongur út 30. juni 2020.

**Fíggjarnevndin, 15. juni 2020, pkt. 7:**
Kristin Michelsen ynskir at atkvøtt verður um bæði tilmælini hjá Mentanarnevndini

1. at leingja sáttmálan í 12 mnd.: Kristin Michelsen atkvøður fyri, Bjarni Hammer og Kristina Roest atkvøða ímóti. Uppskotið fallið
2. at leingja sáttmálan í 6.mnd.: Bjarni Hammer og Kristina Roest atkvøða fyri, Kristin Michelsen atkvøddi ímóti. Uppskotið samtykt

**Kommunustjórin 17.09.2020**
Forkv. í mentanarnevndini ynskir at fáa status á støðuni at bjóða raksturin av kantinuni í Ítróttar- og skúladeplinum í Trongisvági. Uppskot til gjørt til útboðstilfari, og støða skal takast til tíðir kantinan hevur opið.

**Mentanarnevndin, 21. september 2020, pkt. 7:**
Flutt til næsta fund

**Mentanarnevndin, 12. oktober 2020, pkt. 10:**
Meirilutin í Mentanarnevndini Súsanna Bertholdsen og Bjarni Hammer ynskir at orðingin í punkt. 3. verður broytt og orðað.

- ***Upplatingartíðir:*** *Ynskiligt er, at kantinan er opin í sambandi við venjingar gerðandiskvøld, kappingar og tiltøk í vikuskiftunum. Loyvishavarin skal samstarva við húsavørðin í Ítróttarhøllini um virksemið og um upplatingartíðirnar. Umframt at útboðið av mati er av góðari dygd, og at møguleikið er fyri at fáa heilsugóðan mat.*

**Fíggjarnevndin, 21. oktober 2020, pkt. 9:**
Nevndin mælir til, at umsitingin tillagar útboðstilfarið soleiðis at tað verður greiðari.
Skúlakøkurin skal m.a. nevnast í útboðstilfarinum.

Málið verður beint í býráðið.

**Tilmælið: Kommunustjórin 21.01.2021**
Instillingarbólkurin mælir til at, hildið verður fram við verandi loyvishavara, sum hevur rikið kantinuna seinstu uml. 15 árini. Hetta grunda á einar heildarmeting, og tað staðfesting, at ongar klagur ella atfinningar er komnar til umsitingina av rakstrinum, tænastuni ella góðskuni av mati, ið hevur verði veitur hesi seinastu 15 árini í kantinuni av verandi loyvishavara.
Heildarmetingin hjá innstillingarbólkinum er grund á tað tryggu loysnina, sum umsitingin kennir og veit virkar, har virksemið í kantinuni verður avmarka og tillaga og endurskoða til tørvin í Skúla- og ítróttardeplinum, eins og hetta hevur verði gjørt í seinastu 15 árini.

**Býráðið 21. december 2020:**
Einmælt samtykt at bjóða raksturin út samb. Tilmælið hjá Kommunstjóranum, og at freistin at søkja verður 7. januar. 2021.

**Fíggjarnevndin 21. januar 2021:**
Atkvøtt var um uppskotið hjá innstillingarbólkinum.
- Fyri eru: Kristin Michelsen og Jónleyg J. Bech.
- Ímóti: ongin
- Blankt: Bjarni Hammer

**Býráðið 28. januar 2021:**
**Tilmælið A**: Súsanna Bertholdsen mælir til at setanarbólkurin ger ein nýggja og neyvari innstilling við fyriliggjandi tilfari.

**Tilmælið B**: Kristin Michelsen mælir til at at fylgja samtyktina hjá fíggjarnevndini, og tilmælið hjá setanarbólkinum.

**Atkvøtt var um tilmælið A: hjá Súsanna Bertholdsen**
Fyri tilmælið A: Súsanna Bertholdsen, Bjarni Hammer, Kristina Roest.
Ímóti tilmælið A: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Jónleyg J. Bech, Alvi Mortensen
**Harvið er tilmælið A fallið**

Kristin Michelsen ynskir viðmerkt, at at hann tekur frástøðu frá orðingini hjá Súsannu Bertholdsen um at at talan var um vinstra honds arbeiði hjá setanarbólkinum.

**Atkvøtt var um tilmælið B: hjá Kristin Michelsen**
Fyri tilmælið B: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Jónleyg J. Bech, Alvi Mortensen
Ímóti: Kristina Roest
Blankt: Bjarni Hammer og Súsanna Bertholdsen
**Harvið er tilmælið B samtykt.**

**7/21**
**20/00364-8 2 viðgerð av -val av limum í "Aðrar nevndir" §31 Barnaverndina**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 28.01.2021 | 7/21 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 12.01.2021**
Samb. Kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu 6. Partur "Aðrar nevndir" skulu veljast nevndarlimir í:
*-limir vera valdir við lutfallsvalið-*

**Barnaverndin:** -§31, veljast skulu 1 limur og 1 varalimur
- *Eftir at Tvøroyrar býráð samtykti 4. januar 2021, at velja Barbaru Gram sum fastan lim, og Heidi Bech, sum vara lim í barnaverndina, hevur Barbara Gram fráboða, at hon ynskir ikki at halda fram í nevndini fyri barnaverndina.*

**Býráðið 28. januar 2021:**
Alvi Mortensen skjýtur upp, at Steingrím Niclasen verður valdur til fastan lim og Marjun Olsen verður vara limur.
**Einmælt samtykt**

**8/21**

**20/00364-10 2 viðgerð av -val av limum í "Aðrar nevndir" §30 Skattakærunevndina**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 28.01.2021 | 8/21 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 18.01.2021**
Umsitingin er komin eftir, at ein villa er íkomin til valið av limum í skattakærunevndina á býráðsfundinum 4. Janur 2021.

Samb. kommunustýrisskipanini fyri Tvøroyrar kommunu, 6. Partur "Aðrar nevndir" skulu veljast nevndarlimir í §30 Skattakærunevndina fyri Suðuroynna, 2 limir og 2 varalimir. (lutfalsval)

Tilmæli:

- Valbólkur A velur ein fastan lim og ein varalim
  - Valbólkur A mælir til at velja til fastan lim Jens Johannesen og til varalim Hallur í Heiðunum
- Valbólkur B velur ein fastan lim og ein varalim
  - Valbólkur B mælir til at velja til fastan lim Friðgerð Mortensen og til varalim Eyðbjørg Midjord

**Býráðið 28. januar 2021:**
**Einmælt samtykt**

9/21

## 21/00020-1 Føroya Eftirskúli -val av nevnd

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 28.01.2021 | 9/21 |

**Málslýsing:** Kommunustjórin 14.01.2021

Borgarstjórin hevur heitt á kommunustjóran um at seta á skrá til komandi býráðsfund, val av 5 limum í nevndina fyri Føroya Eftirskúla.

- *Málið var lagt fram á býráðsfundi 4. januar 2021, har samtykt var at útseta málið til næst komandi býráðsfund.*

Nevndin umboðar áhugabólkin, sum rekur skúlan, og hevur 2 umboðan í stýrinum fyri Eftirskúlan, samb. Løgtingslóg um eftirskúlar.

### Málsgongdin áðrenn

Tvøroyrar Býráði hevur samtykt hin 29.12.2018 at nevndin fyri Føroya Eftirskúla verður mannað við 5 limum, og umboðini vera:

- Bjarni Hammer
- Mariann Mikkjalsdóttir
- 2 umboð úr MMR, ið MMR sjálvt velur
- Jens Arni Hammerfoss Leo
  - *Mentamálaráðið kunnar Tvøroyrar kommunu hin 28.05.2019, at MMR ongan lim hevur í nevndini fyri Føroya Eftirskúla.*
  - *Mentanarnevndin velur hin 2.12.2019, Cecilia Nólsøe Poulsen í nevndina fyri Eftirskúlan ístaðin fyri Marian Mikkjalsdóttir, sum fer úr nevndini.*

**Nevndin fyri Føroya Eftirskúla er sostatt pr. d.d.: (Øll umboð eru vald av Tvøroyrar býráð)**

- *Bjarni Hammer*
- *Jens Arni Hammerfoss Leo*
- *Cecilia Nólsøe Poulsen*

**Samb. heimasíðuni hjá Føroya Eftirskúla verður kunna um at:**

**Viðtøkurnar:**

*§ 6. Skúlastýrið hevur 5 limir:*

- *2 limir verða valdir í millum foreldur, ið hava børn í skúlanum.*
- *2 limir verða valdir av áhugabólkinum**
- *1 limur verður valdur av – og millum teirra – ið starvast í skúlanum.*
- *Stk. 2. Stýrislimirnir verða valdir fyri 2 ár í senn. Afturval er møguligt.*
- *Stk. 3. Eitt eykaumboð verður valt fyri hvønn av bólkunum í stk, 1 og 2.*
- *Stk. 4. Stýrið skipar seg sjálvt við formanni*

**Stýrið foreldra- og áhugabólkur***

*Ein áhugabólkur, sum er settur av Tvøroyrar Kommunu og einum foreldrabólki, sum er skipaður av foreldrum/verjum hjá næmingum á skúlanum. Hesir bólkar, saman við starvsfólkum á skúlanum skipa stýrið skúlans. -Stýrið skipar seg sjálvt við formanni*

- *Skúlastýrið hevur 6 limir:*
- *2 limir verða valdir í millum foreldur, ið hava børn í skúlanum.*
- *2 limir verða valdir av áhugabólkinum*
- *1 limur verður valdur av – og millum teirra – ið starvast í skúlanum.*
- *1 limur vegna næmingarnar í skúlanum.*
- *Stýrislimirnir verða valdir fyri 2 ár í senn. Afturval er møguligt.*
- *Eitt eykaumboð verður valt fyri hvønn av bólkunum.*

**Stýrið í Føroya Eftirskúla er samansett d.d. samb. heimasíðu skúlans av 6 limum**

- Bjarni Hammer, form. (Valdur av Tvøroyrar býráð/Áhugabólkinum*)
- Jens Arni Hammerfoss Leo (Valdur av Tvøroyrar býráð/Áhugabólkinum*)
- 1 limur verður valdur av – og millum teirra – ið starvast í skúlanum.
- 2 limir verða valdir í millum foreldur, ið hava børn í skúlanum
- 1 limur vegna næmingarnar í skúlanum.

**Lógargrundarlag:**

- Løgtingslóg nr. 83 frá 17. mai 2000 um eftirskúlar,
  - **§ 12.** Eitt skúlastýri skal verða valt til hvønn eftirskúla. Limir tess eru:

    1. 2 foreldraumboð, vald av og ímillum teirra, ið hava foreldramyndugleikan yvir teimum næmingum, sum eru innskrivaðir í skúlan.
    2. 2 umboð fyri áhugabólkin, sum rekur skúlan.
    3. 1 umboð fyri starvsfólkið, valt av og ímillum teirra, ið starvast í skúlanum.
    4. 1 umboð fyri næmingarnar, valt av og ímillum teirra, ið eru næmingar í skúlanum.

## Tilmælið:

Nevndarlimirnir umboðandi Tvøroyrar býráð verða valdir eftir lutfallsháttinum. Mælt verður til at nevndin skipar seg sjálv.

**Býráðið 28. januar 2021:**

Kristin Michelsen mælir til, at Tvøroyrar býráð biður um ein fund við Mentamálaráðið, fyri at hoyra hvønn leiklut Tvøroyrar kommuna hevur í Føroya Eftirskúla sum er, og hvønn leiklut Tvøroyrar kommuna kemur at hava framyvir í Føroya Eftirskúla.

**Einmælt samtykt.**

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

**Til kunningar**

**2/21**
**21/00035-1 Skattatøl 2021**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 21.01.2021 | 1/21 |
| 2 Býráðið | 28.01.2021 | 2/21 |

**Málslýsing: Samanbering av skattainntøkum í 2021**

**Kommunustjórin 20.01.2021**

- Til kunningar/umrøðu eru samanberingar av skattainntøkum (Pf. og A&B inntøkur) fyri árini 2018,2019,2020 Jan.-dec.

**Fíggjarnevndin 21. januar 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 28. januar 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað

Fundurin lokin kl. 18:45

Kristin Michelsen

Anita Vibergsdóttir

Alvi Mortensen

Jónleyg Jespersen Bech

Bjarni Hammer

Kristina Roest

Súsanna Bertholdsen